FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF FINANCE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

**Tórshavn**, 25. oktober 2019

**J.Nr.:** 19/00369
(at tilskila í svari)
**Tygara skriv:**

**Svar upp á fyrispurning nr. 10/2019 eftir tingskipanini § 52a**

**Fyrispurningur frá Beintu Løwe Jacobsen, løgtingsmanni, settur Jørgen Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um asfaltverkið á Sundi**

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvussu nógv er samlaði kostnaðurin fyri asfaltverkið á Sundi, tað vil siga við leigu, umvælingum og keypi v.m.?
2. Var fíggjarlig heimild at leiga, umvæla og keypa asfaltverkið?
3. Ætlar landsstýrismaðurin at kanna málið nærri?

**Svar:**
Sambært roknskapi hjá Landsverki fyri asfaltverkið á Sundi fram til nú hava útreiðslurnar av leigu, umvælingum, keypi o.t. verið 33,4 mió.kr.

| | **2016** | **2017** | **2018** | **2019** | **Tilsamans** |
|---|---|---|---|---|---|
| Viðlíkahald og nýgerð | 348 | 1.778 | 6.117 | 634 | 8.877 |
| Leiga av asfaltverki | 7.733 | 6.551 | 1.500 | 0 | 15.784 |
| Keyp av asfaltverkið | 0 | 0 | 8.782 | 0 | 8.782 |
| **Tilsamans** | **8.081** | **8.329** | **16.399** | **634** | **33.443** |

Í 2016 gjørdi Landsverk avtalu við eitt privat felag um at leiga asfaltverkið á Sundi. Løgtingsgrannskoðararnir hava síðani víst á, at talan var um fíggjarliga langtíðarleigu. Sambært játtanarskipanini er ikki loyvt at gera avtalur um fíggjarliga langtíðarleigu. Í apríl 2019 varð avtala gjørd við útleigaran um at yvirtaka virkið fyri 8,8 mió.kr.

Samanumtikið ber ikki til at siga, at Landsverk hevði heimild at langtíðarleiga ella keypa asfaltverkið á Sundi.

Og ja, málið verður kannað nærri.

Tinganes, 25. oktober 2019

**Jørgen Niclasen**
Landsstýrismaður í fíggjarmálum